# KLH vil hava nevndarlim í Kringvarpsnevndini

**Nýggja Kringvarpsnevndin hevur eftir núverandi uppskoti ikki rúm fyri Kristiliga Lurtara- og Hyggjarafelag (KLH). Aðalfundurin hjá KLH harmast um hetta. Fundurin varð hildin á Skála í gjár**

KRINGVARPSLÓG
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Aðalfundurin hjá KLH var í Meinigheitshúsinum á Skála í gjár. Um 50 fólk vóru møtt til fundin. KLH er eitt felag, sum ráðgevur teimum loftbornu fjølmiðlunum. Endamálið hjá felagnum er at varðveita og verja tær kristiligu sendingarnar, sum verða sendar, og finnast at sendingum, sum eru skaðiligar fyri ta kristnu trúnna. Á fundinum í gjár varð serliga tosað um at verja børn móti sjónvarpssendingum við ósømiligum innihaldi. Funnist varð at sendingum við óhóskandi kynsligum innihaldi og harðskapi.

Uni Næs, formaður, legði fundarfrágreiðingina fram. Hann kom millum annað inn á tær nýggju avbjóðingarnar, sum eru fyri framman.

– Endamálsorðingin hjá felagnum er góð, og hana eiga vit at halda fast við, segði Uni.

### Janus Mohr heiðraður

Janus Mohr hevur starvast í útvarpinum síðani 1975. Nú hann gevst, valdi KLH at heiðra Janusi við einari sømdargávu fyri hansara arbeiði. Hann hevur gjørt nógvar andaligar sendingar í útvarpinum, millum annað hevur hann staðið fyri morgunlestrinum og "Hetta Heilaga Evangeliið skrivar". Janus Mohr var sera glaður fyri gávuna, sum var ein kekkur áljóðandi 10.000 krónur.

Fundarluttakararnir høvdu møguleika at gera viðmerkingar til tað, sum varð borið fram. Eitt av hjartamálunum hjá nógvum var, at fáa tær andaligu sendingarnar endursendar. Víst var á, at sjónvarpið endursendur mestsum allar føroyskar sendingar uttan tær andaligu.

KLH hevur havt ein lim í programnevndini hjá útvarpinum og hjá sjónvarpinum, men í uppskotinum til nýggja Kringvarpslóg hevur KLH ikki fingið tryggjað nakran nevndarlim. Andrias Petersen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin og formaður í Løgtingsins mentanarnevnd, greiddi fundarluttakarunum frá lógaruppskotinum. Andrias fegnaðist um, at útvarpið og sjónvarpið er lagt saman. – Tað skuldi verið gjørt longu í 1984, segði hann.

Ein nevnd verður mannað við sjey nevndarlimum, sum skulu virka sum millumliður millum landsstýrismannin og Kringvarpsstjóran. Kringvarpið fær eitt umboð, løgtingið skal velja 4 nevndarlimir, og landsstýrismaðurin skal velja formannin og næstformannin.

Sambært Andriasi skal hetta gera Kringvarpið politiskt óheft. Fundarluttakararnir stúrdu fyri, at KLH onga ávirkan fer at fáa við nýggju lógini, men Andrias Petersen vísti á, at tað skuldi verið løgið, um eingin nevndarlimur verður í nýggju nevndini, sum umboðar sjónarmiðini hjá KLH.

Løgtingið fer væntandi at taka málið upp aftur, tá ið tað kemur saman aftur á Ólavsøku.




*Janus Mohr móttekur sømdargávuna frá Kristiliga Lurtara- og Hyggjarafelag Mynd: Heini S. Kristiansen*

# Legg ICE inn í tína fartelefon

**Runt allan heimin leggja fólk nú inn ICE í telefonbókina í síni fartelefon. ICE er ein stytting fyri »In Case of Emergency« og er meiningin, at tað skal verða lættari at koma í samband við tey avarðandi, um viðkomandi hevur verið út fyri óhappi**

TELEFON
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Tey flestu eiga eina fartelefon og ganga ofta við henni uppi á sær. Tí er tað natúrligt, um eitt óhapp er hent, at ein fer í fartelefonina at leita eftir teimum nærmastu at ringja til. Tá kann tað verða torført at finna rættan persón, og tí er hugskotið um ICE sprottið.

Tað er sera einfalt at leggja ICE inn sum navn í telefonbókina í fartelefonini og síðani nummarið til tað fólkið, tú vil at tey, ið finna teg skulu ringja til.

Upprunaliga er hugskotið komið úr Bretlandi, har ein portørur varð troyttur av trupulleikanum at royna at fáa fatur á teimum avarðandi. Tá óhapp eru hend, er tað ofta at fólk hava mist vitið ella eru so skelkað, at tey ikki kunnu tosa sjálvi. Hann helt tí, at eitt altjóða navn skuldi gerast, so at lættari er at finna rætta fólkið at ringja til.

Hetta er so ICE – sum týtt til føroyskt merkir »í neyðstøðu«.

Jan Rasmussen, ið arbeiðir sum lækni á Landssjúkrahúsinum, heldur at tað ljóðar sum eitt gott hugskot at leggja hetta inn í fartelefonina.

Í Føroyum stendur sjáldan á at fáa fatur í teimum nærmastu, av tí at samfelagið er so lítið, og øll kenna øll. Men føroyingar ferðast nógv, og tá kann tað verða ein tryggleiki at hava ICE innlagt í telefonina.

Tá er eisini týdningarmikið at ein minnist til at seta 00 298 framman fyri nummarið, so at til ber at fáa fatur á føroyskum fólkum. Og helst skal ein eisini siga við viðkomandi, at tú hevur lagt hann ella hana inn í telefonina sum tín ICE.




*Hetta er eitt dømi um hvussu tað kann síggja út tá ein hevur lagt ICE inn í telefonbókina í fartelefonini. Her er tað nummarið til Sosialin.*

# Hálva milliard í eginogn

**ALS hevði í fjør eitt avlop á knappar 10 mió kr. Samstundis er talið av arbeiðsleysum føroyingum minkað niður um 750**

ALS
*Tíðindaskriv*

Arbeiðsloysið er minkað fyrstu 4 mánaðirnar í 2006 í mun til somu tíð í fjør. Sambært hagtølum hjá Arbeiðsloysisskipanini vóru tilsamans 1.023 arbeiðsleys seinast í apríl 2005 í mun til 748 arbeiðsleys seinast í apríl 2006.

Samlaðu útgjøldini fyrstu 4 mánaðirnar í 2006 eru 7,7 mió. kr. lægri enn fyri sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein lækking á góð 19 prosent, og sannlíkt er, at samlaða útgjaldið í 2006 lækkar samanborið við undanfarna ár.

Samlaðu inngjøldini í 2005 vóru góðar 124 mió. kr. í mun til umleið 106 mió. kr. í 2004. Talan var sostatt um eina hækking á 17%. Tó skal havast í huga, at fram til 1. juli 2004 var ALS-gjaldið 0,75%, men eftir hetta bleiv tað broytt til 1%, sum tað eisini var fyri alt árið 2005.

Samlaðu útgjøldini av arbeiðsloysisstuðli í 2005 var góðar 116 mió. kr. í mun til 107 mió. kr. í 2004. Talan gjørdist sostatt um eina øking í útgjaldinum á 9 mió. kr., ella góð 8%. Til samanberingar kann nevnast, at samlaðu útgjøldini av arbeiðsloysisstuðli frá 2003 til 2004 øktist við 59%.

Við einum ársúrslitið í 2005 uppá 9,7 mió. kr. gjørdist eginognin við árslok slakar 500 mió. kr.